# Stýrisfundarbók FKF

## 08-06-2010 / 8

*Fundarstað:* Kvívík

*Fundur byrjar kl:* 10.00

*Fundur lokin kl:* 12.30

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Asbjørn Djurhuus form. | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | kemur kl. 10:40 |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | |
| Delmar Tausen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Herálvur Jacobsen | |
| Johan Christiansen | |
| Karl A. Olsen | |

**Fundarmál nr: 36**

FKF Jour. nr: 09-096

Reist av: Fíggjarmálaráðnum

Fundarmál: Meirvirðisgjald, broyting í avgjaldstíðarskeiði

Málslýsing: Felagið hevur móttikið uppskot til kunngerð um meirvirðisgjald hjá kommunum v.m. Hoyringsfreistin var 31. mai.

Í mun til galdandi kunngerð eru serliga broytingar framdar í § 5 um tíðarfreistir at lata MVG-uppgerð inn. Tíðarfreistirnar hjá kommununum fara frá 4 til 12 um árið, tvs. At uppgerð skal latast inn hvønn mánað frá flestu kommunum.

Uppskotið var sent FK-bólkinum til viðmerkingar. Svarskriv er sent FMR.

Í svarskrivinum er boða frá, at málið verður tikið upp á næsta stýrisfundi og verða møguligar viðmerkingar sendar FMR.

Sí skjal 36.

Fundarsamtykt: Sent svarskriv góðkent. Broytingin er samb. arbeiðsgongdini í nýggju roknskaparskipanini hjá kommununum.

*Støða: Avgreitt.*

**Fundarmál nr: 37**

FKF Jour. nr: 09-095

Reist av: Jarðfeingi

Fundarmál: Jarðhiti, reglur fyri bygging

Málslýsing: Jarðfeingi hevur sett seg í samband við felagið um borihol til jarðhita. Í hesum sambandi metir teir, at treytir eiga at verða settar til kvalitet av allari installatiónini, tvs. dimensionering av hitaskipan, dimensionering og boring av holi og installatión av hitapumpu. Í dag eru ongin krøv sett til hettar.

Jarðfeingi spyr tí kommunufeløgini, um gerast kann ein mannagongd fyri installatión av jarðhita, har kommunali myndugleikin tryggjar, at sett krøv vera hildin.

Sí skjal 37.

Fundarsamtykt: Biðja Jarðfengi um tøl fyri hvussu effektivur jarðhiti er, eisini í mun til at brúka hann til kommunalar bygningar.

Kommunurnar kunnu gera reglugerð fyri økið og kunnu brúka Jarðfengi sum ráðgeva.

Heita á Jarðfengi um at møta stýrinum og kunna um málið.

*Støða: Avgreitt við skrivi til Jarðfengi tann 10. juni, 09-95_1.4.*

**Fundarmál nr: 38**

FKF Jour. nr: 09-097

Reist av: Innlendismálaráðnum

Fundarmál: Kommunala umskipanin, umboð í politiskan fylgibólk

Málslýsing: Í skrivi dagf. 3. juni 2010, heitir Innlendismálaráðið á felagið at velja 2 umboð í ein politiskan fylgibólk til kommunalu umskipanina og tilgongdina.

Fundarsamtykt: Albert Ó. Ellefsen og Hans Jákup Kallsberg.

*Støða: Avgreitt við skrivi til IMR tann 10. juni, 09-97_1.2.*

## Frágreiðingar

1. Vitjan frá Estlandi
Sveiney greðir frá. Felagið er vertur seinni partin 17. august. Stýrislimir siga frá, um ynskja at luttaka í skránni.

2. KIMO-fundurin í Hetlandi
Kári hevur skrivað frágreiðing sum hann verður biðin at leggja út. Jógvan greiðir frá áheitan frá KIMO um at arbeiða fyri at fáa Íslendingar við í felagsskapin.

3. Arbeiðið í intgratiónsbólkinum
Bergmann greiðir frá arbeiðinum. Fyrst at orða politikk og seinri lóggávu.

4. Ætlan hjá VMR um felags útboðs- og innkeypsreglur fyri tað almenna og kommun
Bergmann greiðir frá. VMR ætlar at orða reglur fyri almennum útboði og vil hava kommunurnar við.

5. Landsbyggireglugerðin.
Jógvan greiðir frá. Fyrislær at FKF heitir á nevndina at kunna limirnar um arbeiðið.

6. Musikskúlin.
Karl greiðr frá. Mangla enn upplýsingar til at kunna gera arbeiðið liðugt.

7. KAF.
Fleiri fakfeløg hava tikið seg saman um samráðingina. Hetta heldur KAF vera fyrimu
Hafa ikki sáttmálar við allar partarnar, so tað verður landið sum leggur út.

## Ymist

1. KSF um samstarvsráð. Frágreiðing um skriv frá KSF um at felagið ikki heldur tað neyðugt við samstarvsráði.

2. Dagstovnalógin. Frágreiðing um skriv frá MMR um at ikki verður gingið felagsins áheitan á møti.